

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 04 - 2012

# Total roynir at tetta gasslekan

Leygarnáttina eydnaðist tað at sløkkja logan frá gasslekanum á Elgin-Franklin leiðini í Norðsjónum, og nú fyrireikar felagið Total seg til at tetta sjálvan lekan. Felagið sigur seg hava tveir møguleikar. Tann fyrri er at lata eitt skip pumpa borirunu niður í brunnin, men tað fer at krevja, at fólk verða flutt aftur umborð á pallin, sum hevur verið manntómur í eina viku. Total sigur, at felagið arbeiðir í løtuni saman við bretskum serfrøðingum fyri at fáa staðfest, um tað er ráðiligt at seta fólk á pallin, sum framvegis er huldur í gassi. Ger Total av at pumpa borirunu niður í brunnin, skal Texas-felagið Wild Well Control loysa uppgávuna, og arbeiðið kann ætlandi byrja innan 10 dagar. Hin loysnin er at bora ein avlastingarbrunn og ein sokallaðan back upp til hann. Total hevur longu gjørt av, hvørjar pallar tað skal brúka til tær báðar boringarnar, og í báðum førum er talan um pallar, sum verða tiknir frá øðrum uppgávum. Total heldur, at lekin stavar frá einari goymslu 4.000 metrar undir havbotninum. Skal felagið bora niður til goymsluna, fer tað at taka seks mánaðir, og kostnaðurin kann koma upp á tríggjar milliardir dollarar, sigur Total.